KÍ-B68 2-2 (1-1):

B68 basti bronsuni í evstu løtu

Talan var meiri um stríð enn um flótandi fótbótlsspæl, tá tað í Klaksvík varð lagt lok á fótbóltsárið

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Klaksvíkingar tóktust við 2–1 sigri á heimavølli leygardagin at skula spenna bein fyri vónunum hjá B68 at vinna bronsukrónurnar. Men so var tað, at Hans Fróði Hansen var upp á spæl. Akkurát sum ta ferðina, tá hann í landsdystinum á Svangaskarði við stútara syrgdi fyri javnleiki.

Fagnaðurin á málskoraranum var í hvussu so er tann sami. Tað var bara tann tíðin eftir, sum Niklas á Líðarenda (hann hevði eina sera torføra uppgávu) hevði lagt afturat. Í síðstu vónini um at fáa mál og harvið javnleik og bronsukrónurnar tveitti B68 alt fólkið fram á vøllin. Hans Fróði Hansen var um reppið at royna ímóti málinum, men klaksvíkingar bjargaðu til hornaspark. Arnold Joensen fór út í vinstra hornið, hagani hann hevur skotið fleiri túsund hornaspørk fyri KÍ. Hesa ferð sendi hann í reyðu B68 blusuni aftur væl og nett innfyri, og við nærra stólpan stakk Hans Fróði Hansen høvdið fram og stýrdi bóltinum í handaru síðuna á málinum. 2–2 og B68 spælararnir lógu í stórari rúgvu á vøllinum.

Hans Fróði Hansen hevði setningin at taka sær av Kurt Mørkøre. Tað er altíð ein stór uppgáva, so teir báðir landsliðsspælararnir og gomlu liðfelagarnir í Sogndal høvdu eina rúgvu av nærdystum, og fleiri ferðir sá tað heilt vandamikið ella kanska drápuligt út. Niklas á Líðarenda tóktist ikki vera heilt álvuligur við støðuna. Tá hann bríkslaði, tí tað so at siga sá út til at vera áfast, møttu veteranarnir dómaranum við hvør sínum púra avvápnandi brosi!

Men tað var eftir ein samanbrest millum Kurt Mørkøre og Hans Fróða Hansen, at fyrsta málið kom. Dómarin metti, at B68 verjumaðurin uttarlaga í brotsteiginum í vinstru síðu hevði verið órægluligur og bríkslaði fyri brotsspark. Toftamenninir hildu seg hava verið vitni til størri brotsspark enn í hesi støðuni, men Kurt Mørkøre var púra kaldur úr ellivu metrum, og harvið syrgdi hann fyri, at miðaltalið hjá honum í málskjótingini í landskappingini í ár fór upp um eitt.

Klaksvíkingar fóru vónbrotnir av vøllinum, meðan toftamenn í bakgrundini síggjast fegnast um bronsumerkini
Mynd: SjH

Tætt og harðligt

Fróði Benjaminsen staðfesti sína støðu sum toppskjútti hjá B68, tá hann javnaði til 1–1. Hann varð spældur leysur mitt fyri, men eitt lítið sindur til vinstu. Klaksvíkingar vildu vera við, at talan var um týðuliga rangstøðu, men tað góvu linjuverjin og dómarin teimum ikki rætt í, og Fróði var púra tryggur, tá hann setti framvið Meinhardt Joensen, sum rættuliga hevur spælt seg upp í KÍ málinum.

Í 2. hálvleiki var talan um eina rúgvu av nærdystum, og ikki var tað frítt, at spælararnir – púra óneyðugt og sera lítið rutinerað – høvdu hug at hevna seg. Hetta kostaði fyrst Allani Joensen hjá KÍ eina útvísing, og Marcello Marcellino hevði bara verið lítla løtu á vøllinum, tá hann sá reytt. Í tí sambandinum var talan so at siga um bardaga, og tað var at undrast á, at ikki uppaftur fleiri spælarar ruku av vøllinum.

Harley Bertholdsen legði úr stuttari fjarstøðu KÍ framum aftur (tá vóru klaksvíkingar undirmannaðir), eftir at innleggið var komið úr vinstru, og hetta tóktist at verða sigursmálið – inntil Hans Fróði Hansen stútaði í málið, og ovurfegni B68 hópurin fekk bronsumerkini frá Steinbirni Jacobsen, býráðsformanni í Klaksvík.

Tomislav Sivic var fyri síðstu ferð á KÍ liðnum (teir saknaðu Atla Danielsen, sum mánakvøldið varð skaddur í unglingadysti), og tað er ivasamt, hvussu tað komandi ár verður við Alexander Djordjevic og Kurt Mørkøre. Hjá B68, sum hesa ferð hevði Jan Petersen sum avgjørdan aftasta mann, spældu Jan C. Dam og Jákup Eli Olsen fyri síðstu ferð.

Dysturin í tølum
KÍ-B68 2-2 (1-1)

1-0: Kurt Mørkøre (br.) 9
1-1: Fróði Benjaminsen 35
2-1: Harley Bertholdsen 80
2-2: Hans Fróði Hansen 89

Dómari: Niklas á Líðarenda (GÍ)

KÍ: Meinhardt Joensen – Ove Nysted, Jan Andreasen, Allan Joensen – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Tomislav Sivic, Fríðin Ziskason, Hjalgrím Elttør – Alexander Djordjevic, Kurt Mørkøre

B68: Kjartan Nesá – Hans Fróði Hansen, Jan Petersen, Messias Perreira – Marlon Jorge, Jan C. Dam, Fróði Benjaminsen, John Heri Dam, Jákup Eli Olsen – Arnold Joensen, Súni Fríði Johannesen

Jan sigur farvæl á Toftum

Men veteranurin, ið sigur seg ongantíð hava fegnast so nógv um eina heiðurskrónu, sum hann gjørdi leygardagin, ætlar ikki heilt at seta skógvarnar á hillina

FÓTBÓLTSTOS
Jóannes Hansen

Jan C. Dam fer ikki aftur at umboða B68. Landskappingardysturin í Klaksvík leygardagin var tann síðsti hjá honum fyri Tofta Ítróttarfelag:

– Eg ætli mær ikki at skriva undir nakran sáttmála fyri komandi ár. Eg rokni við, at eg fari at venja við 2. deildarliðnum hjá HB og at spæla við teimum. Um tað so fer at vísa seg, at teir á besta liðnum kanska fara at hava brúk fyri einum verjuspælara, og um teir so heita á meg, so vil eg ikki avvísa, at eg kann hjálpa til, men tað er ein sannroynd, at tað ikki verður, sum tað hevur verið higartil, sigur Jan C. Dam.

Eftir dystin leygardagin fingu B68 spælarnir bronsukrónurnar hongdar um hálsin. At fáa heiðursmerki er ikki nakað nýtt fyri Jan C. Dam. Hann hevur vunnið trý FM heiti við HB – í 1988, 1990 og í 1998, og hann hevur vunnið steypafinaluna seks ferðir við HB – í 1987, 1988, 1989, 1992, 1995 og í 1998.

– Skal eg vera sannur, so havi eg ongantíð verið so fegin um eina gullkrónu, sum eg var um bronsukrónuna leygardagin. Meðan vit stríddust við at javna, so hugsaði eg aftur á 1994. Tá skoraði GÍ í síðstu løtu í Klaksvík. Harvið tóku teir gullkrónurnar frá okkum. Eg hugsaði, at tá gøtumenn kundu skora í síðstu løtu í Klaksvík, so kundu vit eisini, og tað eydnaðist.

Men bronsumerkini kunnu ikki vera nógv at gleða seg yvir hjá einum spælara, sum hevur verið við til at vinna so nógvar gullkrónur, sum tú hevur vunnið?

– Um tú hevði spurt meg í summarsteðginum, so hevði eg svarað, at eg hevði ikki havt nakra vón um at vinna nakað sum helst. Men síðani tá hava vit verið ógvuliga raskir, og eg haldi, at vit so hjartaliga høvdu uppiborið at vinna okkurt.

Hví hevur talan verið um so ólíka fyrru og seinnu hálvu?

– Eg havi hugsað allar dystirnar ígjøgnum. Ein av stóru munum hevur verið, at vit síðani summarsteðgin hava havt tveir spælarar, sum hava verið so framúr væl upplagdir. Eg hugsi um Hans Fróða Hansen í verjuni og um Fróða Benjaminsen á miðvøllinum. Næst eftir John Petersen haldi eg, at teir báðir eru bestu spælararnir í landinum. Men eg skal bera øllum á Toftum alt gott. Jann Ingi Petersen er ein fínur miðvallarspælari, sum eg heilt víst rokni við rættuliga fer at koma fyri seg komandi ár. Hann hevur spælt fleiri góðar dystir í ár, men tað var spell, at so fá sóu hann spæla í Intertoto Cup dystinum í Lokeren. Tá var hann uttan iva besti maður á vøllinum.

Jan C. Dam spældi fyrstu ferð á landsliðnum í august 1990, tá Ísland vann 3–2 á ovara vølli í Gundadali. Ta ferðina skoraði hann seinna føroyska málið upp á brotsspark. Tilsaman hevur Jan C. Dam spælt 39 landsdystir. Hann hevur droymt um at spæla nummar fjøruti eisini, men hann ásannar, at nú sær tað svart út fyri tí.

Ein tann besta og kanska tann besta dystin spældi Jan C. Dam, tá landsliðið 24. apríl í 1996 tapti 3–1 í Beograd.

– Landsliðið fer leygardagin enn eina ferð niður á Balkan. Tað verður torført hjá teimum ímóti Slovenia, sum skal vinna dystin. Men eg vóni og rokni eisini eitt sindur við, at okkara menn fara at standa seg væl, heilsar Jan C. Dam, sum síðani 1986 hevur verið í fremstu røð í føroyskum fótbólti, tá hann ikki hevur roynt seg í Danmark.

Royn-KÍ 1-1 (1-0):

Javnleikur passaði KÍ betur

Liðini høvdu yvirvág í hvør sínum hálvleiki, tá Royn og KÍ spældu javnt í fyrra uppflytingardystinum til 2. deild. Úrslitið passaði betur til KÍ, sum hevur heimavøll í seinna dystinum

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

3. deildarliðið Royn gjørdi ein rættiligan vørr fyrru trý korterini av uppflytingardystinum ímóti 2. deildarliðnum hjá KÍ. Men eftir hálvleiksteðgin tóku klaksvíkingar sær um reiggj, og tá kundu teir fingið fleiri mál.

Tað var nógvur vindur í Hvalba leygardagin. Vindurin lá næstan upp á tvørs á vøllinum, og hann órógvaði spælið nógv. Liðini gjørdu tó støðuna óneyðuga trupla, tí alt ov ofta vóru bóltar sendir upp í loft, og so segði tað seg sjálvt, hvar bólturin endaði - onkrastaðni langt yviri í bønum, har menn gjørdu klárt til seyðasýning.

Í fyrra hálvleiki var tað Royn, sum var omaná. Hesa løtuna kundi tú skjótt blanda, hvat var liðið úr 2. deild, og hvat var liðið úr 3. deild. Klaksvíkingar høvdu ilt við at byggja spælið upp, og tað var bara í løtum, at teir vóru vandamiklir.

Royn hevði munin

Hinvegin kláraði Royn fleiri ferðir at koma í vandamiklar støður. Allan Michelsen, sum spældi í álopinum saman við pápa sínum, Vilmund, var tvær ferðir í góðar støðu, men fekk einki mál burtur úr. Njálur Niclasen, sum saman við Jákup Midjord stýrdi miðvøllinum hjá Royn í fyrra hálvleiki, hevði skotroynd, og eisini Eyðstein Jacobsen skapti vanda í KÍ-verjuni.

Í hinum endanum hevði KÍ tvær naskar royndir. Onnur var eftir fríspark frá Kristian Andreasen, sum Royn-málverjin bjargaði sera væl, og returbóltin vóru klaksvíkingar líka við at seta í netið. Hin var, tá Eyðun Klakstein sendi bóltin í málið, men hann varð dømdur at verða rangstaddur. Hetta vóru klaksvíkingar ikki samdir við.

Einasta málið í fyrra hálvleiki kom eftir innlegg úr høgru síðu, miðskeiðis fyri málið tamdi Eyðun Gullok Svalbard, og tá hann síðani royndi seg móti málinum, endaði bólturin heilt úti við stólpan, og so var 1-0 til Royn.

Í fyrra hálvleiki kundu fleiri mál komið, men tað var í øllum førum rættvíst, at Royn var frammanfyri.

KÍ kom fyri seg

Avrikið hjá KÍ var ikki vert einum 2. deildarliði í fyrra hálvleiki, men eftir steðgin tóku klaksvíkingar seg um reggj. Teir tóku alt meira yvir á miðvøllinum, og Royn kom ikki til somu møguleikar, sum í fyrra hálvleiki.

Alt oftari var vandi á ferð í brotsteiginum hjá Royn. Leon Bjartalíð hevði skot á stongina, Eyðun Klakstein hevði góða frísparksroynd, og Kristian Andreasen brendi í góðari støðu.

Tá slakir 10 minuttir vóru eftir at spæla bragdaði hjá KÍ. Innskifti Andreas Josephsen stakk til Kristian Andreasen, sum vann nærdystin við hvalbing, og so sendi Kristian millum beinini á málverjanum og í málið til 1-1.

Besta royndin hjá hvalbingum var, tá ein høgur bóltur brast í tvørstongina, men KÍ-málverjin hevði tamarhald á støðuni..

Samanumtikið var úrslitið á góðari leið. Bæði liðini høvdu kjansir til fleiri mál, og tey høvdu leikliga yvirvág í hvør sínum hálvleiki. Úrslitið er tó betri fyri KÍ, sum hevur fingið útivallarmál, sum kann gera mun í endaliga úrslitinum.

Seinni og avgerandi dystur um plássið í 2. deild verður í Klaksvík komandi leygardag.

Tvær 0–loysnir hjá landsliðsspælarum

Bæði Hvidovre og B93 vóru í vikuskiftinum partur av málleysum javnleikum

DANMARK
Jóannes Hansen

Tað gongst framvegis striltið hjá felagunum hjá Óla Johannesen og Øssuri Hansen. Hvidovre og B93 liggja í tunga endanum á næstbestu deildini, og í síðstu viku varð alment kent, at bæði feløgini eru í álvarsomum fíggjarligum trupulleikum.

Í blaðnum í dag stendur, at Óli Johannesen og hinir í Hvidovre skulu hava nýggjan venjara. Vit hava skilt á lagnum, at Óli Johannesen og hinir spælararnir í Hvidovre hava verið fegnir yvir venjaran, og serliga hjá trýmanninum í miðverjuni man tað kennast dyggur smeitur, at Frank Skytte nú fer úr felagnum.

Sunnudagin megnaði Hvidovre eitt gott úrslit. Teir vóru í Farum, har áhugin fyri at fáa teirra lið upp í bestu deildina er rættuliga stórur. 1.425 áskoðarar vóru møttir upp, og tað er eitt høgt tal í næstbestu deildini. Heimaáskoðararnir vóru vónbrotnir, tí einki mál kom. Harvið er brotssparksmálið, sum Óli Johannesen skoraði næstsíðsta vikuskifti, framvegis seinasta málið, sum Hvidovre hevur fingið.

Øssur Hansen og B93 vóru í Fredericia, har tað frammanfyri 311 áskoðarum eisini endaði málleyst. Randers Freja og Atli Gregersen megnaðu eitt gott úrslit á heimavølli. Frem vitjaði, og tað endaði 1–1. Tað sóu 740 áskoðarar.

FCK hepnan sigur á Lyngby

Heldur ikki hesa ferð vóru nakrar føroyingar upp á spæl í bestu donsku deildini

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Tveir av føroysku landsliðsspælarunum, sum í annaðkvøld skulu til Slovenia, umboða felag í donsku superliguni. Men hvørki Christian Høgni Jacobsen í Esbjerg ella Johan B. Hansen í OB fingu í vikuskiftinum dystarvenjing á tí støðinum, sum hevði verið mest gagnligt fyri landsliðsspælarar.

OB spældi á heimavølli ímóti Vejle. 3.588 áskoðarar møttu upp, og teir fingu nakað fyri atgongugjaldið. OB vann 5–1. Fyri tveimum vikum síðum síðani sendi OB Vejle úr steypakappingini, og møguleikin at geva venjaranum sekkin, sum var frammarlaga á dagsskránni fyri tveimum vikum síðani, er heilt kódnaður í Odense. Harafturímóti er lagið einki serligt í Vejle, har teir kenna seg nærkast alt meiri botninum.

Niður á jørðina

Esbjerg hevði vunnið fýra dystir upp í slag, tá teir komu til Gladsaxe. Tað hevur eisini gingið sjáldsama væl hjá AB, síðani teir seldu fleiri landsliðsspælarar. Heimaliðið, sum er í heilt tungum fíggjarligum sjógvi, var greitt omaná hesa ferð, og tað var ongantíð nakað ivamál um sigurin, sum gjørdist 2–0.

AaB styrkti um sína støðu á næstfremsta plássinum, tá teir vunnu 3–2 í Viborg. Hetta var fimti útisigurin av fimm møguligum hjá Aalborg.

Brøndby er framvegis oddaliðið, men hesa ferð noyddust teir at smyrja seg við javnleiki. FCM megnaði 1–1 á heimavølli ímóti oddaliðnum, sum framvegis er ógvuliga sterkt ímóti FCM.

FCK heppið

Í Parkini hevði FCK vitjan av Lyngby. Skuldartyngdu gestirnir vóru væl fyri, og tað hevði avgjørt einki forgjørt verið í tí, um teir bæði eina og tvær ferðir vóru komnir á odda ímóti heimaliðnum, sum eftir UEFA Cup dystin í Jugoslavia tóktist heilt illa upplagt og gjørdi eina rúgvu av mistøkum.

Men tað kom bara eitt mál, og tað fekk heimaliðið. Ungi miðvallarin Christian Poulsen, sum hevur verið skaddur í fleiri vikur, var fyrstur á innleggi úr vinstru, og úr stuttari fjarstøðu og umvegis fótin á einum verjuspælara sendi hann í málið.

Sum vit søgdu í leygardagsblaðnum, so er Todi Jónsson framvegis skaddur. Nú hevur superligan frí inntil annað vikuskifti, og tá rokna teir við og vóna, at Todi verður tøkur aftur.

Molde misti í síðstu løtu

Eftir tepra sigurin er Lillestrøm best fyri í kappingini um norska meistaraskapin

TIPPELIGA
Jóannes Hansen

Lagið var sera gott í Lillestrøm sunnukvøldið. Teir vóru komnir úr Molde við 2–1 sigri. Samstundis hevði Rosenborg bara megnað 1–1 ímóti Lyn. Tað hevur við sær, at Lillestrøm liggur best fyri í kappingini um norska meistaraheitið. Teir eru tvey stig aftanfyri Rosenborg, men teir hava spælt ein dyst færri, og teir eiga heimadyst á ímóti Rosenborg.

Tí er ikki at undrast á, at mótstøðumenninir hjá Jákupi Mikkelsen og hinum í Molde frammanfyri 7.604 áskoðarum vóru hjartans fegnir, tá teir í 94. minutti høvdu skorað til 2–1 og dómarin so at siga beinanvegin blásti av.

Seinna málið fingu teir eftir frísparksinnlegg. Bólturin fór nakrar ferðir aftur og fram í brotsteiginum, áðrenn verjumaðurin, Arne Vidar Moen, smekkaði til. Bólturin tók í ein av verjuspælarunum og snýtti fullkomuliga Jákup Mikkelsen í Molde málinum.

Tætt alla tíðina

Tað hevði avgjørt ikki verið av leið, um Molde hevði fingið javnleik burturúr. Talan var alla tíðina um sera tætta uppgerð. Tað leikaði á frammanfyri bæði málini, og Jákup Mikkelsen hevði fleiri ferðir høvi at vísa gott málverjuspæl.

Molde kom á odda í 37. minutt. Verjuspælarin Trond Strande skoraði eftir horna. Støðan helt sær inntil í 71. minutti. Tá stútaði verjuspælarin Arild Sundgot langa frísparkssending í bleytum boga upp um Jákup Mikkelsen.

Ósigurin var eitt stórt vónbrot hjá Molde, men teir varðveita kortini fjórða plássið, og møguleikin fyri altjóða fótbólti komandi ár er avgjørt ikki burtur.

Gott lag í Sogndal

Tá landsdysturin í Slovenia er farin afturum leygarkvøldið, fer Kurt Mørkøre yvir aftur til Sogndal, har hann framvegis er sáttmálabundin. Hvussu tað verður við fótbóltsframtíðini hjá stóra málskjúttanum hjá KÍ er ikki avgjørt. Í samrøðu við Norðlýsið fríggjadagin segði Kurt, at tað hava verið følarar úr bæði Noregi og Svøríki. Tað er eisini kent, at fleiri at feløgunum í Føroyum fyrr í summar vístu Kurt Mørkøre stóran áhuga.

Í Sogndal er lagið gott. Tað tykist vera greitt, at liðið eisini komandi ár fer at spæla í bestu deildini. Sunnudagin styrktu teir nógv um sína støðu, tá teir vunnu 3–2 á útivølli ímóti Tromsø. Håvard Flo skoraði tvey av málunum hjá Sogndal.